# Bilar

Nr. 212 • fríggjadagur • 2. november 2001 • 75. árg.

Chrysler Grand Voyager innan



# Chrysler Grand Voyager – ein forgangari innan MPV bilar

*Jón Johansen frá Ivan Johansen bilum sýnir her fram nýggjastu útgávuna av Chrysler Grand Voyager*



**Tað var Chrysler Voyager, ið saman við Renault Espace vóru íbirtararnir til teir vælumtóktu og rúmliga MPV bilarnar. Í mars í ár rullaði Voyager nr. 9 millión, ein silvurgráur CRD diesel, út av verksmiðjuni í Graz í Eysturríki**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Chrysler Voyager, ið komu á marknaðin fyri 18 árum síðan, eru so væl umtóktir í Evropa, at teir umframt at verða gjørdir í USA og Canada, eisini verða gjørdir í Eysturríki. Í USA hava Voyager ligið á odda í mong ár, og hava nú 35 prosent av amerikanska marknaðinum fyri MPV bilar.

### Tvær støddir

Chrysler Voyager er ein stórur og rúmligur MPV luksusbilur, í besta amerikanska stíli, har komfortur og koyrieginleikar er heilt í topp. Bilarnir verða gjørdir í tveimum støddum, har Grand Voyager er 20 cm longri. Talan er í báðum førum um rúmligar 7 persónabilar. Baklúkan og dragihurðarnar á síðunum kunnu eisini vera el-drivnar. Setrini kunnu vendast og stillast upp á allar hugsandi mátar, ella takast heilt úr, um brúk er fyri meira plássi til viðførið.

### Økonomiskur diesel

Motorurin er ein 4 syl. 2.5 litur turbo diesel við common rail innspræning og 141 hk. Herfyri setti Voyager rekordina fyri MPV bilar í hesum klassanum. Bilurin koyrdi 1.780 km uppá 75 lirar av brennievni, ella 0,043 litur fyri hvønn kilometur. Motorurin hevur ein toppferð uppá 185 km/t og koyrir frá 0-100 km/t uppá ca.12 sekund, ið er sera gott fyri ein bil í hesi støddini.

### Væl ljóðdoyvdur

Bilurin, vit royndarkoyrdu, var ein væl útgjørdur Grand Voyager í SE útgávuni, við aircondition, fart piloti, elrútum, sportsfelgum og AM/ FM stereoradio við fløguspælara og 6 hátalarum. Nógv er gjørt burturúr at fáa bilin væl ljóðdoyvdan, eins og hann hevur nógvar innbygdar trygdarskipanir. Fólk frá FDM hava royndarkoyrt fleiri av nýggju útgávunum, og fáa bilarnir sera góð ummælir.



*Grand Voyager hevur dragihurðar á síðunum, og er léttur at koma inn og úr. Bilurin kann leverast við el-drivnum síðuhurðum og baklúku*




## Chrysler Grand Voyager SE 2.5 Turbo Diesel

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2.5 litur 4 syl. turbo diesel 141 hk v. common-rail innspræning |
| 0-100 km/t | ca. 12 sek. |
| Dekkstødd | 215/65-16 |
| Stødd: | |
| Longd | 509,3 cm |
| Breidd | 199,7 cm |
| Hædd | 174,9 cm |
| Prísur | kr. 382.400,- sum persónbilur<br>kr. 224.000,- + mvg sum Van (vørubilur) |
| Søluumboð | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tlf.313666 |



## Nissan yvirskot



Eftir at Nissan, ið er 3. størsti bilaframleiðari í Japan, hava skorið útreiðslurnar niður og sagt hópin av starvsfólkunum upp, hava teir nú eitt hálvárligt yvirskot uppá 15.6 milliardir krónur

*Kelda: Motor Magasinet*

## 700.000 færri bilar



Bilaframleiðarar í USA og Evropa hava ætlanir um at skerja framleiðsluna við upp til 700.000 færri bilar, komandi 3 mánaðirnar, samstundis sum teir vænta at næsta ár verður sera trupult við søluni av bilum

*Kelda: Motor Magasinet*

## Ultra Grip 6



Nýggja Goodyear vetrardekkið, Ultra Grip 6, stóð seg sera væl í eini dekktest í november útgávuni av Bil Magasinet millum 10 onnur vetrardekk.

*Kelda: Bil Magasinet*

ÚT AT KOYRA

# Ferðsluskaðar mótvegis øðrum skaðaorsøkum

**Null-hugsjónin býtir ábyrgdina um ferðslutrygd millum brúkaran og teirra, sum skipa fyri og gera vegakervið. Á hesum yvirlitinum sæst, at næstan ein triðingur av teimum, sum láta lív av vanlukkuávum í Svøríki, doyggja í ferðsluni**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*

Í øllum framkomnum londum er nágreinilig løggáva galdandi um útbúnað, trygdarviðurskifti, arbeiðaravernd o.a., tá tað snýr seg um verkstaðir, virki og onnur arbeiðspláss, og er tað skylda arbeiðsgevarans at bera so í bandi, at tey ymisku arbeiðsplássini til fulnar lúka hesar lógarásettu reglur. Tað eru arbeiðseftirlitini, sum gjølla fylgja við um trygdarviðurskiftini eru í lagi. Tá so ein vanlukka hendir, verða skaðaatvoldirnar gjølla kannaðar, og ikki minst um trygdarviðurskiftini eru í lagi.

### Null hugsjónin

Null hugsjónin býtir ábyrgdina um ferðslutrygd millum brúkaran og teirra, sum skipa fyri og gera vegakervið, men høvuðsábyrgdin at forða fyri ferðsluskaða verður nú løgd á herðar teirra, ið gera vegir, berghol og brýr, og á tey, ið gera lógir og kunngerðir, áseta hámarksferðir og umsita tær, gera bilar, barnastólar, stoytkoddar o.s.fr. Vit kunnu ikki bert sita og hoyra og lesa í fjølmiðlunum um ferðsluvanlukkur, og síðan bert bíða til til næsta vanlukkan rámar á sama stað.

### Álvarsligari avleiðingar

Vit síggja her, at 29 prosent av teimum, sum láta lív av vanlukkuávum í Svøríki, doyggja í vegaferðsluni. Men tað, yvirlitið ikki sýnir, er tann veruleika, at meira enn helvtin av teimum børnum og ungdómum, sum doyggja av vanlukkuávum, láta lívið í ferðsluni. Tí eru avleiðingarnar av ferðsludeyða, avlamni o.s.fr. nógv álvarsligari, enn um borið verður saman við nógvar álvarsamar sjúkur og í tí sambandi lækkaðan livialdur ella vánaliga heilsustøðu.

*Brot úr fyrilestri hjá Petur J. Sigvardsen starvsnevndarformanni í RFF.*




Deyðaatvoldir hjá fólki, sum doyðu í Svøríki av vanlukkuávum.

# Hans Andrias Johannesen – keypt 50 bilar síðan 1946



*Kári Hansen, Opel sølumaður hjá P/F Meinhardt Arge, handar her Hans Andrias Johannesen bil nr. 50, ein Opel Agila. Tað manglar lítið í, at Hans Andrias hevur keypt ein bil um árið, síðan hann byrjaði at koyra bil í 1946*

**Í seinastu viku keypti Hans Andrias Johannesen í Klaksvík bil nr. 50, samstundis var hetta bilur nr. 30 frá Auto Service og Meinhardt Arge**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Hans Andrias Johannesen byrjaði at koyra bil í Klaksvík í 1946, og tað hevur verið hansara livibreyð seinastu 55 árini. Hann var koyrilærari í 50 ár, frá 1946 til 1996. Fyrsti bilurin var ein Ford frá Wenzel Petersen, síðan keypti hann 15 nýggjar og 3 brúktar Vauxhall frá Vilhelm Nielsen, og ein Mitsubishi frá Faroediesel í Klaksvík. Hetta eru tilsamans 20 bilar.

### Næstan ein bil um árið

Síðan hevur Hans Andrias keypt 30 bilar frá Auto Service og Meinhardt Arge. Teir eru av bilmerkjunum: Peugeot, Talbot, Datsun og Nissan. Hann koyrdi eina tíð í Auto, hjá Hjørleif W. Høgnesen og síðan 1960 hevur hann koyrt fyri seg sjálvan. Hesin Opel Agila, hann keypti nú hendan dagin, er ein privatbilur, men Hans Andrias koyrir framvegis líkvognin í Klaksvík, sum hann hevur gjørt seinastu 33 árini. Tað er manglar lítið í, at Hans Andrias hevur átt ein bil um árið, síðan hann byrjaði í 1946.



*Hans Andrias koyrdi á Bilstøðini í Klaksvík, sum byrjaði í 1961, við hesum Ford Zodiac, ið hevði nr. Fø1283*